# Megnar mentanarhús í Fuglafirði



Eyðun Eliassen vann kappingina um búmerkið

VÍGSLA

*Jan Müller*

Leygardagur 29. juni er dagur, sum verður seint gloymdur í Fuglafirði og í føroyskum mentanarhøpi. Tá varð stásiliga og megnar mentanarhúsið í Fuglafirði alment tikið í brúk. Hetta er tí ein stórur dagur í Fuglafjarðar søgu, tí við hesum húsi er skaptur ein sera góður og tryggur karmur um mentanarlig tiltøk í framtíðini. Henda dagin kundu tey mongu, sum í mong ár hava stríðst og strevast fyri at fáa bygdini og oynni eini høli til fólksliga mentan og tiltøk annars, frøðast um, at loksins var verkið liðugt.

Og nógv er komið burtur úr fyri tær umleið 12,5 mill. kr., sum húsini standa í í dag. Fuglfirðingar og oyggjafólkið fyri ikki at siga Føroya fólk hava fingið eitt hús, sum kann brúkast til sjónleik, konsertir, listaframsýningar, ráðstevnur, fundir og til øll hugsandi tiltøk, eisini til brúdleyp, veitslur og samkomur av ymsum slag.

Tað var tí eisini ein hátíðardámur í hesum rúmligu og snotuligu húsunum, tá nærum 1000 fólk úr Fuglafirði og øðrum plássum í landinum vóru savnað at vera við til vígsluna av húsunum. Tað var Eyðun Hansen, formaður fyri hesi stóru verkætlan, ið beyð vælkomin. Síðani hugleiddi Arnold Abrahamsen, ein av undangongumonnunum í sjónleikarafelagnum um søgu felagsins. Eftir tað trinu nakrir av leikarunum frá fyrsta leikinum, ið varð spældur í felagnum, "Hjá Dalabóndrum" frá 1955, á pallin og Hans Hansen, listamaður og ein av frægu íblásarunum í bygdini, spældi uppá harpu og sang.

Síðani vórðu virðislønir latnar til trý tey bestu uppskotini til búmerki. Her vann Eyðun Eliassen við einum sera livandi og rámandi búmerki. Nr. tvey gjørdist Poul Andreas Mikladal og nr. 3 Kenneth Nygaard. Sera stór undirtøka var annars fyri at vera við í hesi kappingini. Høvi varð eisini at heilsa húsinum, og tað gjørdu Jórun Høgnesen og Dávur Winther fyri Klaksvíkar Býráð. Húsið fekk í gávu sera sigandi og snotuligan málning eftir Edward Fuglø. Eisini umboð fyri Norðyar Sparikassi vóru fram kvøðu og var gávan ein tjekkur uppá 30.000 kr. Norðoyar Sparikassi hevur annars verið ein hollur stuðul undir byggingini. Eisini umboð fyri Fuglafjarðar Býráð bar fram kvøðu. Tað var Dánjal Vang. (Tað og annað venda vit aftur til í mikudagsblaðnum, blaðm.) Niels Midjord, sum hevur teknað húsini segði eisini nøkur orð. Seinasta tiltakið var uppboðssøla av málningum. Undir hátíðarhaldinum spældu tónlistafólk uppá nýggja Steinway-flyguli.



Øll ættarlið vóru við til hátíðarhaldið



Nøkur av teimum, sum hugnaðu um fríggjakvøldið





Nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði

Myndir: Jan Müller

# Mentunarhúsið í Fuglafirði

HUGLEIÐING

*Hans J. Hansen*

Leygardagurin 29. juni var fyri meg ein stórhending, tí mentunarhúsið í Fuglafirði varð alment tikið í brúk. Søgan er long, og tí verði eg noyddur at krympa hana ein heilan deil. Í Fuglafirði høvdu vit spælt sjónleik, síðani vit vóru smábørn av og til, men felag var einki, her vantaði ein nýggj innspræning fyri at koma víðari. So kemur ein fittur og skilagóður maður Arnold Abrahamsen frá Strondum, og verður settur sum lærari í bygdini. Hann giftist fuglfjarðar gentu og verður verandi. Tað gekk ikki long tíð, so stovnar Arnold eitt sjónleikarfelag, minnist meg rætt, gjørdist eg limur dagin eftir. Endamál felagsins var at skapa ans fyri sjónleiki og at útvega pening til eitt nýtt hús, men fyrst máttu vit hava fyribils hølir at framføra í. Gamla dansistovan var síðani keypt og innrættað av nýggjum við smærri broytingum útvendiga. Um somu tíð var kommunan komin í knípi, tí framhaldsdeildin var komin til bygdina, men tað var eingin fimleikarhøll í skúlanum, og hon mátti útvegast í stundini ella kom kommunan at missa framhaldsdeildina. Eg sá tað ikki tá, men í dag dugi eg at síggja tað, at har sum nakað er frammanundan, har nørist altíð aftrat. Í dag er bæði studentaskúli og handilskúli í kommumuni. Men fara myndugleikarnir fyrst at taka burtur av, so kann hetta gerast ein skrúva uttan enda, tí fyrst fór expeditiónin, síðani gjaldstovan, síðani tollstovan og til seinast sýsluskrivstovan og løgreglan, og vit skulu ikki gera okkum nakrar vónir at fáa nakað aftur, fyrr enn vit eru ein suverenur statur. Rom var ikki bygt eftir einum degi, og leingi er tað í væl skal vera.

Menn, sum hava verið við í grindarakstri, hava lagt til merkis, at tá ið kvessingur er í grindini, so er hon ikki at fáast við. Soleiðis kunnu ótangar stinga seg upp millum ungdómin, teir eru fáir, men teir kunnu gera nógv um seg. Tá ið eg var formaður í sjónleikarafelagnum, tá vóru einaferð 12 WC kummir brotnar í 12 mánaðir. Hesin formaðurin, Eyðun Hansen, hevur verið so hyggin, at hann hevur keypt tær úr rustfríum stáli, og tað skal hann hava stóra tøkk fyri. Nú skal eg fortelja tykkum eina lítla søgu. Sama kvøldið sum Sigfríður Vørðhamar varð valdur til borgmeistara, ringdi eg hann upp, yngsti honum tillukku og bað hann bera so í bandi, at vit fingu húsið niðanfyri gomlu dansistovuna. Hann svaraði, at hann kundi ikki gera tað av, men hann skuldi arbeiða, hvat hann kundi fyri málinum, og nú stendur húsið har. So í mínari verð eigur Sigfríður sum tá var myndugleikin ta størstu

Framhald á síðu 38

Limir í Fuglafjarðar Sjónleikarfelag framførdu burtur úr fyrsta leikinum í felagnum, »Hjá Dalabóndrum«



